# KVÆÐINI ROCKA SUM ONGANTÍÐ FYRR

**Rockbólkurin heldur fast um sín sermerkta kvæðarock, og áhugin fyri bólkinum uttanlands er støðugt vaksandi. Seinni í ár kemur ein nýggj fløga frá bólkinum, og næsta ár ætlar bólkurin aftur at fara at ferðast meira við sínum tónleiki**

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Rockbólkurin Týr hevur verið ein tann mest virkni føroyski bólkurin í útheiminum seinnu árini. Teir hava spælt í londum sum Russlandi, Týsklandi, Íslandi, Svøríki, Noregi og Danmark, og tónleikurin hjá teimum røkkur so víða, at ummæli eru at finna í tíðarritum í øllum hugsandi londum kring heimin, og tey hava enntá við sær, at søluføgan hjá bólkinum er rættiliga fitt uttanlands.

Nú um dagarnar kom tað fram, at fløgusølan hjá Tý í USA er vaksandi, eftir at teir hava fingið umrøðu á eini internetsíðu har, og áður hava eisini týskarar og norðurlendingar í stórum tali keypt innspælda tónleikin hjá Tý.

## Byrjaði í Prixnum

Tað var nakað heilt fyri seg, tá ið rockbólkurin Týr, sum eingin kendi nakað til, var við í Prix Føroyum í 2001.

Bólkurin spældi til eitt innleiðari umfar í Suðuroy, og tað endaði við, at fólk tóku saman á gólvinum, tá ið serstaka útgávan av Orminum Langa rungaði í seigari rocktakt.

Tað gjørdist byrjanin til ein spennandi føroyskan bólk, sum hevur verið sera virkin í útlandinum og tykist verða betri fyri enn nakrantíð áður, nú bólkurin arbeiðir við nýggjari fløgu og hevur sett kuffertini til síðis í eina tíð.

Týr skal spæla næstu fløguna hjá sær inn í danska Hansen Studio í heyst, og hetta er sama studio, sum bólkurin spældi sína seinastu – og nógv bestu – fløgu inn fyri tveimum árum síðani.

## Frambrot við Eiriki Reyða

Við útgávuni Eric The Red fekk tónleikurin hjá Tý eitt slíkt frambrot, at talan alt í einum gjørdist um rocktónleik í altjóða flokki.

Við týðuliga íblástrinum frá føroyskum kvæði og norðurlendskari gudalæru fann bólkurin ein stíl, sum eingin annar bólkur í heiminum hevur. Samstundis vóru greiðir referansur til klassiskar rockbólkar sum Black Sabbath og Led Zeppelin.

Útgávan Eric The Red hevur verið ummæld í nógvum tíðarritum og heimasíðum uttanlands, og ummælini hava verið sera góð. Eisini her heima hava verið rósandi orð til bólkin, og tónleikarin Petur Mohr Reinert helt í sínum ummæli, at Eric The Red er nógv tann besta fløgan, sum nakrantíð er komin út í Føroyum.



## Hugsa um næstu útgávuna

Týr hevur ikki ferðast so nógv í ár, sum bólkurin hevur gjørt undanfarin ár, men tað er eitt val, sum manningin í bólkinum hevur gjørt.

Teir arbeiða við at gera nýggjan tónleik til næstu útgávuna, og tað er fyrst og fremst har, orkan verður løgd í løtuni. Men teir eru altíð sinnaðir at hava onkra framførslu, og teir vera við til Atlantic Music Event leygarkvøldið. Har fáa teir eisini møguleikan at vísa seg fram mótvegis nógvum útlendskum tónleikagestum, og tað er funnin fress-ur.

Týr lovar, at næsta tónleikurin á næstu fløguni hjá bólkinum, fer at líkjast tí, sum Týr er kent fyri, men teir ætla eisini at royna nakað nýtt og flyta seg eitt sindur á nýggju fløguni.

Løgini til tónleikin eru føroysk og norðurlendsk, og teir fara sum vant at syngja á bæði føroyskum og enskum. Harafturat siga teir, at teir eisini ætla at syngja á onkrum øðrum norðurlendskum máli, og tað er nakað nýtt hjá Tý. Triðja fløgan hjá Tý kemur út í vetur, og næsta ár ætla teir sær at spæla meira í útlandinum aftur.

# GUÐRUN GONGUR UNDAN Í DANMARK

**Guðrun Sólja Jacobsen er eitt tað kendasta føroyska tónleikanavnið í Danmark, og hon hevur longu fingið boð til ein danskan festival í summar**

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Eitt av týðandi hugskotunum við Atlantic Music Event er at vísa føroyskan tónleik fram mótvegis útheiminum, og her er Guðrun Sólja Jacobsen ikki í nakrari truplari støðu, tá ið tað snýr seg um Danmark.

Hon er gjøgnum kappingina Stjørna eitt kvøld blivin eitt kent navn í donskum tónleiki, og meðan onnur føroysk nøvn droyma um at fáa ein kjans á einum donskum festivali gjøgnum Atlantic Music Event, so hava boð longu verið eftir Guðrun. Hon skal nevniliga verða við á Jelling Musikfestival, sum verður hildin síðst í mai mánaði.

Guðrun syngur javnan til konsertir í Danmark, og hon hevur síðani gjøgnumbrotið í Danmark givið tvær fløgur út á danska marknaðinum – tað er ikki gerandiskostur hjá føroyskum tónleiki.

## Røddin í fokus

Guðrun Sólja Jacobsen hevur eina framúr góða rødd, og tað er stóra styrkin í hennara framførslum. Hon kann hugtaka og fanga fólk í øllum aldri, og hóast uppgávurnar hjá henni stundum hava virkað ovurhondsstórar – frammanfyri túsundtals fólki og beinleiðis sjónvarpi í Danmark – so hevur hon als ikki verið nervað av hesum og hevur hvørja ferð havt eina professionella og innliga framførslu.

Fyrst í juni mánaði skal Guðrun verða við á eini stórari føroyskari konsert í Keypmannahavn. Konsertin gongur undir navninum Tríggjar Havfrýr, og saman við Guðrun fara eisini Lena Anderssen og Eivør Pálsdóttir at syngja til hesa konsert.

Men fyrst verður tað uppgávan í Føroyum, har eisini fólk úr øðrum norðurlondum kunnu sleppa at hoyra føroysku songkvinnuna.

